# Almanna og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. januar 2024 |
| Mál nr.: | 23/02407-22 |
| Málsviðgjørt: | Armgarð Weihe |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um bókasavnsráð

Við heimild í § 4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn verður ásett:

**§ 1.** Landsstýrisfólkið tilnevnir eitt bókasavnsráð, sum skal ráðgeva landsstýrisfólkinum í bókasavnspolitiskum og bókasavnsfakligum málum og gera tilmæli til landsstýrisfólkið um menning og samskipan av bókasøvnunum.

**§ 2.** Uppgávan hjá bókasavnráðnum er:
1) at ráðgeva landsstýrisfólkinum í bókasavnspolitiskum og bókasavnsfakligum málum við tí fyri eyga at tryggja dygd og menning á bókasavnsøkinum,
2) at viðgera og kunna um bókasavnspolitikk og bókasavnsfaklig rák og gera tilmæli um menning av føroysku bókasøvnunum og
2) at fáa til vega vitan og hagtøl um føroyska bókasavnskervið og fylgja við altjóða gongdini á bókasavnsøkinum, so at henda vitan kann verða tikin við sum grundarlag fyri tilmælum um menning og samskipan av bókasavnsøkinum.

**§ 3.** Bókasavnsráðið hevur 7-9 limir, ið landsstýrisfólkið tilnevnir fyri 4 ár í senn, fyrstu ferð í 2024. Limirnir kunnu verða tilnevndir av nýggjum.

*Stk. 2.* Limirnir skulu tilsamans umboða myndugleikar, stovnar og fakfólk, ið eru viðkomandi fyri dygd og menning á bókasavnsøkinum.

*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið tilnevnir limirnar eftir tilmæli frá viðkomandi stovnum og feløgum, harundir Kommunufelagnum, Megd, Námi, Fróðskaparsetri Føroya, LISA, Fjølriti, Føroya Lærarafelag, Yrkisfelagnum Miðnámi og Bókavarðafelagnum.

*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið tilnevnir ein av limunum til forfólk í ráðnum.

**§ 4.** Bókasavnsráðið hevur í minsta lagi 2 fundir árliga.

*Stk. 2.* Forfólkið kann heita á serkøn fólk at ráðgeva bókasavnsráðnum í sínum arbeiði.

**§ 5.** Landsbókavørðurin er skrivari í bókasavnsráðnum, og Landsbókasavnið hevur skrivstovuhaldið hjá ráðnum.

*Stk. 2.* Landsbókasavnið rindar fundarsamsýning og ferðaútreiðslur hjá limunum í bókasavnsráðnum sambært reglum Fíggjarmálaráðsins um tænastuferðir og fundarsamsýningar.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almanna- og mentamálaráðið, 8. januar 2024

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen